# Bjargingarfelag nýggja nevnd

TÍÐINDASKRIV
*Havnar Bjargingarfelag*

Á aðalfundi í Havnar Bjargingarfelag hin 21. apríl 2002 varð nýggj nevnd vald. Tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali, hesir vóru Súni Vinther og Guttormur Eysturoy, meðan Kartni Olsen áður hevur tikið seg úr nevndini. Jens Hansen og Edvard Kjeld stóðu ikki fyri afturvali. Í nevndini vórðu valdir Fríðrikkur Heinsen, Súni Vinther og Heini Eysturoy. Niels Olsen er tiltakslimur.

Nevndin hevur skipað seg við Heina Eysturoy sum formanni, Jens Hansen sum næstformanni, Fríðrikki Heinesen sum skrivara og Edvardi Kjeld sum nevndarlimi.

Havnar Bjargingarfelag er ein sjálvboðin felagsskapur, ið hevur til endamáls at veita hjálp í samband við vanlukkur á sjógvi og landi, í tilburðum har verandi skipanir ikki einsamallar klára uppgávuna.

Havnar Bjargingarfelag hevur seinastu árini havt sera ringar arbeiðsumstøður, og hevur virksemið verið tarnað av, at felagið eingi høli hevur havt at húsast í, eftir at hølini ið felagið hevði á Bryggjubakka vórðu latin øðrum.

Nýggja nevndin hevur sett sær fyri, at arbeiða við at fáa felagnum nøktandi høli. Tann útgerðin felagið eigur, er m.a. ein bilur og onnur bjargingarútgerð, ið krevur at vera í góðum standi og vera til taks tá ið brúk er fyri henni.

Nýggja nevndi hevur somuleiðis sett sær fyri, at skipa fyri skeiðum og venjingum t.d. skeiðum í 1. hjálp og leiting. Somuleiðis er ætlanin at fáa greiðu á hvønn leiklut felagið skal hava, í sambandi við eina komandi tilbúgvingarætlan.

Felagið er fyri øll, ið á ein ella annan hátt vilja geva eina hjálpandi hond, tá ið vanlukkur henda. Uppgávurnar eru so mikið ymiskar í felagnum, at tørvur er á øllum, gomlum og ungum, kvinnum og monnum.

Tey í ynskja at gerast limir í felagnum eru vælkomin at boðað felagnum frá hesum.

Havnar Bjargingarfelag
Postsmoga 137
FO-110 Tórshavn
teldupostur: hbf@lfb.fo

# Føroya Bjór viðurkenning á Flatlondum

TÍÐINDASKRIV



Básin hjá Føroya Bjór hevði vitjan av fleiri víðagitnum ølskibentum og góvu teir tí føroyska bjórinum góð skoðsmál.

Bryggjaríið Føroya Bjór hevur júst luttikið á stórum ølfestivali, har fleiri víðagitnir ølskribentar vitjaðu básin og góvu tí føroyska ølinum góð skoðsmál. Ølmentanin í okkara grannalondum blómar í hesum tíðum, og størri og størri dentur verður lagdur á góðskuna, og at ølið skal vera eitt njótilsi fyri allar sansir. Tilfar frá Ferðaráðnum var eisini á básinum, og fleiri bóðu um faldarar um Føroyar sum ferðamannaland

Um vikuskiftið var tann árligi ølfestivalurin hildin í Valbyhøllini í Danmark, og eins og í fjør umboðaði Føroya Bjór Føroyar. Eini 4000 fólk vitjaðu teir tríggjar dagarnar, tiltakið vardi, og hóast tey vitjandi høvdu eini 450 ølsløg úr øllum heiminum at velja í, var básurin hjá Føroya Bjór sera væl vitjaður.

Fleiri kendir ølskribentar vóru eisini við á festivalinum, og millum tey mongu sum vitjaðu Føroya Bjór vóru m.o. tann navnframi Michael Jackson, sum hevur skrivað eitt ótal av bókum um øl og whiskey, Gregg Glaser, sum tey seinnu árini er vorðin alt meira viðurkendur sum øljournalistur og skrivar fyri ymisk tíðarrit kring allan heimin, og kekkin, Jan Kocka, ið somuleiðis er ein altjóða viðurkendur ølkennari, og ferðast víða hvar til slíkar festivalir. Allir vóru teir sera hugtiknir av tí føroyska ølinum, og á Føroya Bjór lata tey eisini væl at festivalinum og fegnast um herðaklappini frá dønum og ølkennarum annars.

Fitt av føroyingum høvdu eisini leitað sær á ølfestivalin í tí góða summarveðrinum um vikuskiftið, og harumframt vitjaðu fyrrverandi danski matvøruráðharrin, Ritt Bjerregaard, og danska sjónvarpsrásin, TV2, sum gjørdi fleiri innsløg til sínar tíðindasendingar um vikuskiftið.


Føroya Bjór marknaðarførdi eisini Føroyar sum ferðamannaland. Við sær á ølstevnuna høvdu tey faldara og plakatir frá Ferðaráið Føroya.

### Ølmentan, góðska og ferðavinna

Ølmentanin blómar á Flatlondum í hesum tíðum, og danir eru farnir meira og meira at hugsa um góðskuna á øli. Orð sum luktur, smakkur, flavour og aroma vóru javnan at hoyra á festivalinum, og tey fðra sløgini, sum Føroya Bjór hevði við, vórðu eisini dúgliga smakkað.

Tað var kortini ikki bara øl, sum Føroya Bjór borðreiddi við um vikuskiftið. Við sær hevði bryggjaríið eisini plakatir og faldarar frá Ferðaráði Føroya, og var hetta sostatt eisini ein marknaðarføring av Føroyum sum ferðamannaland.

# Ansi eftir rottu

TÍÐINDASKRIV
*Heilsufrøðisliga starvsstovan*

Í sambandi við, at regluliga innsavningin av burturkasti er steðgað í stórum parti av landinum, ger Heilsufrøðisliga Starvsstovan vart við fylgjandi:

Heitt verður á øll um, at ansa eftir at einki burturkast liggur og sløðist. Tað er bannað at brenna ella at blaka burturkast fyri bakka. Kommunur, fyritøkur og húsarhald eiga at goyma sítt burturkast í afturlatnum íløtum ella afturlatnum postum til viðurskiftini eru komin í rættlag. Burturkastið eigur at verða goymt á einum staði og á ein hátt, so at hetta ikki er til umhvørvisligan ella heilsuligan ampa.

Serliga skal ansast eftir, at húsdjór, rotta, fuglur ella vindur ikki spjaðir burturkasti.

# 17. mai hildin í Føroyum

HÁTÍÐARHALD
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Komandi fríggjadag er 17 mai, og hesin dagur er á hvørjum ári ein serligur dagur fyri allar norðmenn. Í Noreg og kring allan heim, har norðmenn halda til, verður dagurin hildin og hann er eins hátíðarligur og okkara ólavsøka. Hann er eisini tjóðardagur norðmanna og tá eru norðmenn meira norskir enn vanligt. Teir savnast í búna, syngja fosturlandssangir, eta gott og summir fáa ein lítlan eisini. Úti í heimi savnast norðmenn vanliga á sendistovum ella har sjómannskirkjurnar halda til 17. mai og eru ikki slíkir stovnar nærhendis, so savnast tey privat

Og í Føroyum eru eisini norðmenn og teir ætla sær ikki at standa aftanfyri sínar landsmenn í heimlandinum ella aðrastaðni. Árliga 17. mei-dagshaldið verður hesaferð hjá Thorbjørn Brochs, Hellutún 9, Tórshavn, kl. 18.00 og fyrireikararnir biða fólk um vinarliga boða frá luttøku á tlf. 311707/316565 ella 328124 áðrenn 15.05.



# Skal ganga skjótt fyri seg

**Partarnir narkæst hvørjum øðrum á Gamla Apoteki, og semja tykist at vera um fleiri avgerandi punkt, men tað skal ganga skjótt fyri seg**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*


*Tað er ofta trupult at samráðast, og tímarnir gerast nógvir og langir.*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Gamla Apotek:** Í skrivandi stund hava Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin ikki enn gjørt av, um teir skulu setast við samráðingarborðið til reellar samráðingar, hóast meldingar hava givið onnur ljóð áður.

Sum skilst krevja partarnir greiðar útmeldingar, og flokkarnir hava allir víst áhuga fyri at royna hesa samgonguna. Millum annað heitt Jóannes Eidesgaard á løgmann um at royna hesa kombinatiónina.

Men eitt er vist. Samráðingarpartarnir skulu gera skjótt av, tí tingið kemur saman mikudagin(í dag), og tá skulu nevndir og tingformaður veljast. Hetta er flokkarnir eisini klárir yvir, og tingmanningar hjá flokkunum eru eisini komnar á Gamla Apotek.

Sum skilst standa partarnir ikki so langt frá hvørjum øðrum, men finnast skal á eina leið í búskapar- og sjálvstýrisspurningin-um.

Alt kann tó skjótt broytast.

# Sambandsflokkurin vil hava ávirkan

**Lisbeth L. Petersen, formaður í Sambandsflokkinum, segði á Gamla Apoteki fyrrapartin týsdagin, at flokkurin vil í samgongu, tí hann vil hava ávirkan á rikna politikkin**

SAMRÁÐNGAR
*Edvard Joensen*

**Gamla Apotek:** Lisbeth Petersen, formaður Sambandsfloksins, segði við Sosialin fyrrapartin týsdagin, at Sambandsflokkurin hevur gjørt av at royna samráðingar um eina samgongu saman við Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum.

– Vit vilja hava ávirkan á tann politikkin, sum førdur verður, og tí er eingin ivi um, at vit vilja vera við, segði hon.

– Ætlaðu vit ikki tað, høvdu vit als ikki verið her í dag, segði sambandsformaðurin í viðmerking til tað, løgmaður segði fyrr um morgunin um, at Sambandsflokkurin ikki hevði gjørt av, um hann vildi vera við ella ikki.


*Lisbeth Petersen, formaður Sambandsfloksins, sigur, at flokkurin sjálvandi vil í samgongu, so hann kann fáa ávirkan á rikna politikkin*

# Nú fækka møguleikarnir


*Anfinn Kallsberg, løgmaður, ásannar, at verður eingin samgonga burtur úr royndini við Sambandsflokkinum, fara hansara møguleikar at fækka*

**Løgmaður segði týsmorgunin, at nú fækka møguleikar hansara, áðrenn hann fer at boða løgtingsformannin um frá, um hann leggur frá sær**

SAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*

**Gamla Apotek:** Anfinn Kallsberg, løgmaður, segði, tá hann kom til samráðingarfund týsmorgunin, at nú fækka møguleikar hansara fyri at skipa samgongu. Sambandsflokkurin hevði tó ikki avgjørt, um hann vildi í samgonu ella ikki, segði løgmaður.

Løgmaður viðgekk, at verður einki burtur úr hesum møguleikanum við Sambandsflokkinum í staðin fyri Tjóðveldisflokkinum, mátti hann sanna, at tað nærkast, til hann fer at boða løgtingsformanninum frá, at hann letur samráðingarrættin frá sær.

Hinvegin vildi hann einki siga um, hvørt hann vildi royna at fáa Miðflokkin við í eina samgongu. Men hann váttaði tó, at hann helst vildi hava ein breiða samgongu.

Løgmaður segði, at hann framvegis bíðaði eftir svari frá Sambandsflokkinum, hvørt tað skuldi verða nakrar samráðingar ella ikki. Sum skiltist á løgmanni, var einki avgjørt, frá Sambandsfloksins síðu.

Anfinn Kallsberg segði, tá hann kom á fund, at formaður Sambandsfloksins, Lisbeth Petersen, hevði biðið um eitt prát týsmorgunin, og at tað var tað prátið, nú var farið til. Realitetssamráðingar vórun ongar avtalaðar yvirhøvur, segði løgmaður.

Løgmaður væntaði ikki, at nøkur samgonga fór at vera gjørd, áðrenn tingið kemur saman í dag.

– Tað er mær vitandi ongantíð hent enn, at ein samgonga er skipað eftir einum samdøgurði, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, tá hann møtti á gamla Apoteki týsmorgunin.



Brandur Enni konsert kl. 21.00
Kambsdalur 17. mai · Tvøroyri 20. mai · Tórshavn 24. mai
Atgongumerki á 95 kr. í forsølu

Prísur við dyrnar 120 kr.
Statoil í Leirvík, Klaksvík, Saltangará, Skálabótni, Tórshavn, Tróngisvági og Vági
Shell í Gøtudali og við Streymin · Kioskini hjá Bassa í Fuglafirði · Kunningarstovan í Havn